# KT og fiskivinnutøkni



*Torkil Holm Petersen stjóri í Formula.fo skrivar:*

Fara vit 10 ár ella longur aftur í tíðina vóru Føroyar eitt undangongu land innan nýtslu av tøkni í fiskivinnuni. Útlendingar komu til Føroyar fyri at samanbera teirra tøkni við okkara, og niðurstøðan varð aloftast at tær føroysku loysnirnar vóru millum tær bestu. Sum dømi um virkir sum gingu undan við at menna loysnir, kunna nevnast Com-Data, OilWind og Datronik.

Síðan kemur eitt tíðarskeið - í byrjani av 90-inum - har fiskivinnan ikki gongur so væl, har vit missa undangongustøðu okkara. Virkir og skip fara á húsagang og sera lítlar íløgur verða gjørdar innan framleiðslu ídnaðin yvirhøvur. Millum annað av hesi orsøk mistu vit oddin innan áðurnevndu framleiðslutøkni.



*Laksapakking/flokking. Brúkara- og framleiðslustýring*









Tey seinastu trý árini eru menn aftur farnir at gera íløgur innan framleiðsluvinnuna. Tá virkir, skip og alivinnan í dag gera íløgur innan framleiðslutøkni, verður hetta gjørt við stórum varsemi, og gera menn eitt drúgt og gott kanningar arbeiði áðrenn íløgan verður gjørd. Hetta er skilagott og tryggjar at mest fæst burtur úr íløguni.

Tá hugsað verður um nýggja framleiðslutøkni er ein stór broyting hend. Í dag gerst KT ein alt størri og meira týðandi partur av framleiðsluloysnuni. Hyggja vit eftir hvat KT verður brúkt til, er hetta serliga innan umráði sum

- stýring av framleiðslu, rávørugoymslu, vøru undir framleiðslu og liðugtvørugoymslu,
- mátingar av tildømis úrtøku og góðsku,
- sporing og vøruváttanir,
- at skapa eitt samlað yvirlit, ið verður brúkt sum amboð til innkeyp og sølu.

Formula.fo og Petersen & Guttesen hava saman við Marel ment týðandi partar innan hetta øki. Sum dømi kunna nevnast, at hesi feløg í felag hava ment flokkara, flowlinjur og sundirskerarar sum eru væl skjótari og neyvari enn teir undanfarnu. Hetta kemur millum annað av, at vit eru farnir frá mekaniskari stýring til edv-stýring og intelligens. Umframt fyrimunir innan sjálva framleiðsluna, kunna fleiri fyrimunir fást við at knýta framleiðslustýringina saman við fíggjarstýringsskipanini (bókhaldinum). Á henda hátt fáast - alla tíðina - neyvar upplýsingar yvir raksturin (bæði rakstrarúrslit og fíggjarstøðu) tá goymslur og framleiðsla vm. kunna lesast beinleiðis í fíggjarstýringsskipanini.

Marel og Formula fegnast um gongdina innan fiski- og alivinnuna í Føroyum, og tað er neyvan nakað at taka seg aftur í, at partanir í felag eru størsti útvegari av KT til áðurnevndu vinnur í dag.

Partarnir hava góðar vónir um framtíðina, tí í løtuni verður arbeitt við fleiri spennandi verkætlanum. Nevnast kann til dømis ein nýggjur flokkari til laks, sum góðskumetur, flokkar og pakkar alt í einari arbeiðsgongd. Hesin er longu royndarkoyrdur í Føroyum, við sera góðum úrsliti. Eisini verður ein nýggjur liðugtvøruflokkari til fløk og sundurskorin stykkir royndur í hesum døgum. Hesin byggir á heilt nýggja hugsan og tøkni, og er bæði skjótur og neyvari enn teir undanfarnu.

Innan fyrisitingarliga partin eru eisini nýhugsan farin fram. Loysnir eru gjørdar har tað er møguligt at spora hvønn sáttmála og ordra fyri seg, og ávísa allar inntøkur og útreiðslur sum standast av hesum. Her verður til dømis eisini tikin hædd fyri møguligum skeivleikum, sum kunnu standast av at vøra verður tikin aftur og seld øðrum. Formula hevur lagt seg eftir at so nógvar arbeiðsgongdir sum gjørligt verða sjálvvirkandi. Upplýsingar verða bert inntøppaðir einaferð, síðan verður alt endurbrúkt av sær sjálvum. Sum dømi kunnu vit nevna útflutningspappír, heilsuváttanir vm. Frammanfyri nevnda loysn verður í løtuni innkoyrd hjá einum kunda í Føroyum.

Tað er av stórum týdningi at vit brúka tað tilfeingi sum er í Føroyum og stuðla við at keypa tað føroysku loysnina. Á henda hátt tryggja vit, ikki bert at framleiðsluídnaðurin sjálvur áhaldandi verður á odda, men at hann eisini fær tað røttu tænastuna. Eisini birtir hetta undir at nýggj útflutningsvinnan hevur møguleika at menna seg. Hetta hevur Formula longu prógva sum saman við Noma-Tek, og við hjálp frá Fiskavirking, hava selt fleiri loysnir til Norra, Ísland og Danmark.

# Prískanning

**Rætting til prísir seinast**
Av misgáðum fingu vit skeivar prísir frá Formula.fo í seinastu viku. Her eru røttu prísirnir og vísa teir at Formula.fo hevði verið bíligast í øllum 4 útgávum av Office pakkanum frá Microsoft.

| **Formula.fo** | |
|---|---|
| Standard | kr. 5.300,00 |
| Std. uppstiging | kr. 3.100,00 |
| Professional | kr. 6.400,00 |
| Prof. upps. | kr. 4.000,00 |

**Bíligasta RAM í Føroyum fær tú frá Formula.fo**
Hesaferð hava vit valt at kanna prísirnar á RAM frá føroysku KT-virkjunum, sum vit eisini hava samanborið við hvat RAM kann keypast fyri á internetinum.
RAM prísirnir hava seinastu árini svingað rættuliga nógv. Orsøkirnar hava verið ymiskar. Ein stór RAM verksmiðja í Korea brendi einaferð og tað viðførdi at prísirnir ruku upp eftir stuttari tíð. Sum við øllum øðrum er tað útboð og eftirspurningur sum avgera prísleguna. Seinastu tíðina hava prísirnir verið hækkandi aftur. Hesaferð sigst at orsøkin er at framleiðarnir ikki klára at fylgja við eftirspurninginum.
Aftur hesaferð vísir tað seg at bíligast er at handla hjá Formula.fo í Havn. Men kanningin staðfestur eisini at pengar eru at spara um keypt verður á Alnetinum. Hesaferð hava vit samanborið við Alnethandilin www.computerstore.dk.

| | 32 MB | 64 MB | 128 MB |
|---|---|---|---|
| Com-Data | 600,00 | 1.000,00 | 1.900,00 |
| Farodane | | 1.390,00 | 2.437,50 |
| Formula.fo | 424,00 | 725,00 | 1.340,00 |
| Teldu-tænastan | 525,00 | 750,00 | 1.350,00 |
| www.computer store.dk | 398,75 | 748,75 | 1.248,75 |

Allir prísir eru í kr. og við MVG og moms.
Prísirnir frá computerstore.dk eru uttan eventuellan GAT-toll.
Um fleiri KT-virkir kundu hugsað sær at verið við í okkara prískanningum, kunnu tær venda sær til sid@sosialurin.fo.

# Spurnakassin

**PANEL**



Magnus S. Petersen, *advokatur*

*Hava tit ein spurning um telduútbúna (HW) ella ritbúna (SW), hvat tit hava rætt og loyvi til ella okkurt heilt annað, kunnu tit senda tykkara spurning til spurnaðarkassan.*
*Í panelinum at svara spurningum hava vit serkøn fólk at heita á.*
*Sendi spurningin til: sid@sosialurin.fo.*
*Hesaferð svarar Magnus S. Petersen, sum arbeiðir sum advokatur á Advokatskrivstovuni.*

**Spurningur:**
Eru MP3 fílir lógligar?

**Svar:**
***MP3 fílir og upphavsrættur***
*Tað hevur seinastu tíðina vundið sera nógv uppá seg at leggja tónleik út á Interneti í góðari góðsku, sum so verður gjørt við MP3-fílum. Hetta hevur ofta við sær brot á upphavsrættin hjá honum, sum er upphav til tónleikin. Í Danmark eins og í Føroyum er tað lóg nr. 158 af 31.05.1961 om ophavs-retten til "litterære og kunstneriske værker", sum regulerar flestu av hesum viðurskiftunum.*
***Upphavsrættur til tónleik***
*Upphavsrættur til tónleikaverk, hevur eftir § 2 í nevndu lóg við sær einkarrætt til at ráða yvir verkinum við:*

- *at framleiða eintøk av verkinum og*
- *at gera verkið algongt fyri almenninginum.*

*Einkarrætturin til at* ***framleiða eintøk*** *av verk-inum fevnir um øll sløg av kopiering av verkinum, herundir eisini at kopiera eitt tónleikaverk til telduna.*
*Í sambandi við kopiering verður í donskum rætti skilt millum kopiering í analogum formi og í digitalum formi.Kopiering frá digitalum formi til digitalan form er ikki loyvd uttanso at loyvi er fingið frá rættindahavaranum.*
*Einkarrætturin til at* ***gera verkið algongt*** *hevur m.a. við sær, at bert rættindahavarin kann framføra verkið alment. Líkamikið um framføringin fer fram á konsert, í útvarpi ella sjónvarpi, er talan um at verkið er vart. Eftir donskum rætti er eisini talan um almenna framførslu tá eitt tónleikaverk verður lagt út á Internetið, herundir sjálvandi eisini um verkið verður lagt út í formatinum MP3.*
*Tað krevst tí loyvi frá rættindahavaranum. Ofta er talan um fleiri rættindahavarar, sum loyvi skal útvegast frá. Rættindini verða oftast í Danmark og Føroyum umsitin av KODA, NCB og øðrum. Tá tónleikur er á internetinum, kemur hann í lag soleiðis:*
*1. Innlegging (Uploading) á ein servara*
*2. Sjálvur tann digitali flutningurin*
*3. Heimtøka (Downloading) til heimatelduna*
*Talan er ofta um ólógliga kopiering, bæði av teimum sum leggja tónleikaverkini út á servararnar og tey sum downloada ljóðfílirnar (ofta MP3), um loyvi ikki er útvegað frammanundan. Undantøk eru tó eisini í lógini, sum ikki verður komið inn á her.*
***Revsing og endurgjald***
*Bæði hann sum leggur tónleikin út á Interneti og hann, sum downloadar tónleik, sum er vardur av upphavsrætti kunnu revsast vanliga við bót men revsiheimild er upp til 3 mðr. hefti. Endurgjaldsskylda liggur eisini á honum sum ger seg inn á upphavsrættin.*

**Eitt sindur um MP3**:
MP3 er stytting av MPEG3, sum aftur er stytting av **M**oving **P**icture **E**xperts **G**roup.
MP3 er eitt format, sum gevur møguleika fyri at goyma ljóðfílir á telduni.
Tað, sum serliga eyðkennir formatið er, at ljóðfílirnir verða sera nógv krympaðar og krevja tí lítið pláss á harð-diskinum. Hóast tað um-fatandi krympingina er góðskan sera góð.
Tað eru nógv ókeypis forrit á Internetinum, sum evna at umgera eina ljóðfílu t.d. tónleik á vanligum CD, til MP3. Hesi forrit eru lóglig. Somuleiðis er við avbera góða formatinum MP3. Tað er ikki har hundurin er grivin.



# Teldustøðingar í Føroyum

**Tað ganga bert fáir mánaðir til fyrstu føroysku teldustøðingarnir verða klaktir av Føroya Handilsskúla. Hóast vinnan var tann, sum rópti eina harðast eftir fólki, so er hon kortini ikki so fegin, at hjálpa sjálv, tá á stendur**

*Sveinur Tróndarson*



*– Meðan fyrireikingarnar til útbúgvingina vóru í gongd, var einki til hindurs fyri, at vinnan skuldi hjálpa, men nú vit eru byrjaði, eru bert fáar fyritøkur, sum halda orð, sigur Heðin Samuelsen um teldustøðingaútbúgvingina*

Einaferð fyrst í november mánaði verða teir fyrstu teldustøðingarnir - ella datamatikararnir - lidnir við útbúgving sína. Teir 26 nemingarnir byrjaðu fyri tveimum árum síðani, sum teir fyrstu á nýggju útbúgvingini, sum føroyingar annars noyddust til Danmarkar at fáa sær. Av teimum 26 hanga 23 í, og tað er sera gott.

Men hóast tað var væl ætlað frá øllum, áðrenn útbúgvingin byrjaði, so hevur tað kortini ikki hilnast nóg væl við samstarvinum við vinnuna, eftir at farið var ígongd.

**Vinnuni tørvaði fólk**
Tað var tíðliga í 1998, at Undirvísingar- og Mentamálastýrið heitti á Føroya Handilsskúla, um at fara undir fyrireikingar til eina teldustøðingaútbúgving.

Eins og í øðrum londum var stórt trot á útbúnum fólki á telduøkinum og sum støðan var tá, bar ikki til at fáa eina slíka útbúgving í Føroyum.

Tey, sum vildu útbúgva seg, noyddust til Danmarkar, men tað var ein trupulleiki fyri føroysku kt-vinnuna, at bara tey fægstu funnu vegin heimaftur. Starvstilboðini í Danmark vóru lokkandi og avbjóðingarnar stórar, og tí valdu flestu teldustøðingarnir at vera verandi í Danmark.

Handilsskúlin fór undir fyrireikingarnar, og fram móti sumri var klárt at byrja - næstan ...

– Hóast tað var UMMS sum heitti á skúlan, so var játtanin ikki tøk fyrr enn summarfrítíðin var byrjað. Tí varð ikki lýst eftir fólki fyrr enn alt ov seint, men 68 fólk søktu og av teimum sluppu 26 gjøgnum nálareygað, greiðir Heðin Samuelsen, sum undirvísir - og samskipar - á teldustøðingaútbúgvingini.

**Samstarvið manglar**
Upprunaliga var tað, sum sagt, eitt ynski frá vinnuni, at fáa eina tílíka útbúgving í Føroyum.

Manningartørvurrin var og er enn - stórur. Virkir og stovnar hava broytt hugsunarhátt, tá tað snýr seg um kt, og tað hevur við sær, at tað ikki er serliga torført at fáa starv aftaná lokna útbúgving.

Kortini er Heðin Samuelsen ikki nøgdur við samstarvi við vinnuna, tí nú útbúgvingin er farin ígongd, gongur serstakliga striltið at fáa lærarar og próvdómarar.

– Trupulleikin er tí, at skúlin er noyddur at seta egnar lærarar til útbúgvingina og tann støðan heldur ikki í longdini. Talan er um lærarar, sum, longu frammanundan, undirvísa fullan dag, og eykaundirvísingin ger teimum dagin uppaftur longri. Men skal útbúgvingin haldast gangandi, so eru vit noyddir at halda á. Hinir lærararnir á skúlanum skulu eisini eiga, at teir hava verið serstakliga raskir at hjálpa, tá heitt verður á teir, sigur Heðin.

Tí heldur hann, at tað er neyðugt at finnast at teimum virkjum, sum áðrenn undirvísingin byrjaði, søgdu, at tey vildu hjálpa.

– Í veruleikanum eru bara nøkur heilt fá virkir, sum hava hildið orð, og tað er óheppið, sigur Heðin.

**Øðrvísi samanseting**
Sum sagt frammanfyri, so vóru longu trupulleikar frá byrjan.

Játtanin var ov sein í 98 og í 99, tá skúlin annars ikki ætlaði at taka næmingar inn, kom als eingin játtan.

– UMMS heitti á okkum um kortini at taka næmingar inn. Vit ætlaðu at bíða av tí at eingin játtan var, men vit fingu at vita, at hon kom og at vit skuldu bara lýsa eftir næmingum. Tað gjørdu vit so - við fyrivarni. Men játtan kom eingin. Í fyrsta umfari gloymdi UMMS hana, og í seinna umfari gloymdi Fíggjarmálastýrið hana. Vit hildu kortini, at vit høvdu skyldu at byrja tá vit høvdu lýst eftir næmingum, og tað gjørdu vit so, greiðir Heðin frá.

Men trupulleikarnir høvdu við sær, at skúlagongdin ikki byrjaði fyrr enn 25. oktober og tað er nógv seinni enn vanligt er hjá handilsskúlanæmingum.

Hóast hetta ikki er orsøkin, so heldur Heðin Samuelsen, at tað er rætt, at seta spurnartekin við, um útbúgvingin, sum hon er samanskrúvað nú, er røtt.

Sum útbúgvingin er nú, skulu tey lesandi fyrst lesa 2 1/4 ár á Handilsskúlanum fyri at fáa eina teldustøðingaútbúgving. Ætlanin var, at tey aftaná á Fróðskaparsetrinum kundu lesa í 1 1/4 til hálvtannað ár fyri at fáa eina bachelorútbúgving. Hetta er kortini ikki komið upp á pláss enn, og tað er at finnast at, heldur Heðin.

– Eg haldi annars, at tað er beistaleingi, at lesa í fýra ár fyri at fáa eina bachelorútbúgving. Tí kundi eg hugsa mær, at hon var sett eit sindur øðrvísi saman, sigur hann.

Uttan at læsa seg fastan á nakað ávíst, nevnir hann dømi um eina kombinatiónsútbúgving millum Fróðskaparsetrið og Handilsskúlan ella, at Handilsskúlin fær status, sum KT-háskúli. Hetta eru eisini tankar, sum fólk í vinnuni sjálvari hava verið inni á og tí verdir at hava í huga.

Spurningurin er so bara, um Fróðskaparsetrið er »gear-að« til eina slíka útbúgving, sum ikki er á sama høga endastøðið, sum aðrar fróðskaparsetursútbúgvingar, men meiri at rokna sum ein millumútbúgving á hægri stigi. Men tað er nakað, sum Fróðskaparsetrið sjálvt má sleppa at svara uppá.

Hóast tað nú fer at nærkast endanum hjá fyrsta liðnum av føroyskum teldustøðingum, so veit Heðin at siga okkum, at skúlin enn einki hevur frætt frá UMMS um útbúgvingin er góðkend í Danmark ella ikki.

– Vit hava fleiri ferðir heitt á stýrið, fyri at fáa góðkenning, men vit hava hvørki hoyrt orð ella eið frá teimum. Tíverri, sigur hann.

Tað skuldi annars ikki verið trupult heldur hann, tí undirvísingin gongur fyri seg eftir somu reglugerð, sum samsvarandi danska útbúgvingin, og sjálvur heldur Heðin, at okkara stendur einki aftanfyri ta donsku.

– Bøkurnar vit brúka, eru enntá nýggjari enn tær, tey vanliga brúka í Danmark. Tær eru amerikanskar og nógvar teirra eru ikki komnar í danskar handlar enn. Tær verða útvegaðar til okkum beinleiðis úr Amerika, og eru dagførdar, sigur Heðin Samuelsen.

**sveinur@sosialurin.fo**

SKEIÐTÆNASTA HANDILSSKÚLANS * STH
útbúgving, eftir- og víðariútbúgving á Føroya Handilsskúla
Marknagilsvegur 77
Postsmoga 177 • FO 110 Tórshavn
Tel. 31 88 13 • Fax 31 33 74
T-postur: fh-sth@post.olivant.fo
Heimasíða: http://sth.olivant.fo

FØROYATELE
FAROESE TELECOM
Tinghúsvegur 3 • Postrúm 27 • 110 Tórshavn
Tel. 30 30 30 • Fax 30 30 31
T-postur: ft@ft.fo
Heimasíða: www.tele.fo

WWW.VIT.FO Tlf: 31 99 14
SKEIÐ - NETUMSITING - HEIMASÍÐUR
JournalVIT - GóðskuVIT - KommunuVIT - IntraVIT

ELEKTRON
...ein livandi leiklut í kunningarsamfelagnum

SpF Teldu Tænastan
Staravegur 5 • Tlf.: 317620 • Fax: 317699 • www.tt.fo
Vit hava stórt úrval av:
Teldum • EDV-tilhoyri
Printarum • Telefax
Scannarum • Forritum
Telduspølum • Fartelefonum
Skrivstovumøblum

ACROBAT/PDF SKEIÐ
Nýggj skeiðtænasta frá Farodane
Acrobat og PDF verða sera nógv umtalað í løtuni.
PDF verður góðkent á støðugt fleiri støðum sum skjalaviðgerðarformát.
Hetta ger seg galdandi innan skjalaviðgerð/skjalaflutning um internetið, eins væl og innan elektroniskar ”prentlutur” v. m.
Fyrsta skeiðið byrjar 12. apríl
TILMELDING frá heimasíðu okkara: kvasir.farodane.fo
- ella ringið tlf. 211861 ella 311414. e-mail: kvasir@farodane.fo
SKEIÐSTOVAN KVASIR FARODANE
SKOTARÓK 14
100 TÓRSHAVN
TLF. 211861 og 311414
FAX 317534
fd-3c-00